# Óli Eiler Wolles 70 ár



10. juli fyllir Óli E. Wolles 70 ár (sonur Elspu og Óla Wolles av Trøllanesi). Hann varð føddur í 1937 á Trøllanesi, er tvíburðabróður við Karin á Grønastøð, og eru tey næstsíðst í røðini av 8 systkjum.

Aftaná 7 ára skúlagang fór hann til skips, fyrst við sluppini Gudrun í 1 ár, Arnevik, Barskor og Norðlýsinum, Atlansfarinum í 4 ár, Havman (norskur bátur), Norðhav, Glottanum og síðani Tindinum. Sum smádrongur var hann eisini við pápa sínum á útróðri við bátunum Makivík og Koralia.

Tá ið hann hevði verið til sjós í sløk 10 ár, fór hann upp á land at arbeiða og flutti til Klaksvíkar. Hann byrjaði í Hermetik, fór so á Heilsøluna hjá Kjølbro at arbeiða í 1 ár, áðrenn hann fór at arbeiða á Flakavirkinum hjá J/F Kjølbro, sum nú eitur Kósin. Har arbeiddi hann sum formaður og sum arbeiðsmaður til 2002, tá hann brádliga var noyddur at gevast vegna sjúku.

Tey flestu munnu kenna Óla sum ein raskan, arbeiðssaman og fryntligan mann. Honum dámar væl handaligt arbeiði og hevur gingið nakrar vetrar í kvøldskúlanum til smíð og hevur tilevnað mangt og hvat, m.a. vøggu og rugguhest til abbabørnini.

Hann hevur í nógv ár gingið á fjall á Trøllanesi og í Mikladali, raskur at fletta og er mangan farin út til fólk at fletta aftaná ein strævnan arbeiðsdag. Óli hevur altíð dámt væl at fleyga fugl norðuri á Nesi og annars fáast við alt tað, sum lívið í føðibygdini ber í sær.

Hansara hjartamál má sigast at vera Stjørnan, 8 mannafarið sum hann hevur saman við beiggja sínum Helga. Nógvar løtur eru farnar til útróður og stimitúrar, og mong munnu eisini mangan hava fingið eitt kók frá honum.

Ì frítíðini dámar honum væl at hyggja eftir fótbólti, er KÌ fjeppari og letur illa at, tá ið tað ikki gongur so væl. Sigur seg annars at verða Tjóðveldismann.....

Óli er heimkærur, dámar væl at hugna um børnini og abbabørnini. Altíð hava tey verið væl móttikin í Kongaríkium og nú í Sambýlinum á Heygnum. Heimið hevur altíð staðið opið, og fastur táttur hevur verið góður føroyskur matur.

Vit vilja ynskja Óla hjartaliga tillukku við føðingardegnum og Harrans signing. Vónandi ført tú ein góðan og hugnaligan dag.

# 45 ára starvsdagur

## á Tryggingarfelagnum Føroyar



Á sumri 1962 var 19 ára gamla havnargentan Hjørdis Egholm nýklaktur studentur av síðsta studentsholdinum á VBV úti á Skansa.

Sama summar fór Hjørdis í starv á Tryggingarsambandinum–byrjunardagurin var 9. juli 1962.

45 ár eru nú liðin, og enn situr Hjørdis á sama palli sum stjóra- og stjórnarskrivari. Við so mongum árum í skjáttuni hevur Hjørdis stóra vitan og royndir, ið duga og sjálvsagt allar møguleikar, at geva frá sær týdningarmiklan arbeiðsførleika í arbeiði sínum á tryggingini.

Hesa tætt við hálvu øldina hevur hon starvast undir 4 stjórum, Thomas Thomassen, Marius Thomassen, Jens Petur Arge og núverandi stjóri Gunnar í Liða.

Rættuliga stórar broytingar í tryggingarviðurskiftunum hava verið hetta drúgva skeið, men dugnaskapur og framúr gott arbeiðslag og ikki at gloyma fryntliga medferð Hjørdisar, hevur verið partur av tí ný- og umgerð, ið henda.

Tá innanhýsisblaðið hjá tryggingini í 1980-90unum ofta var ein hent kunnan- og vitanarblóma, var Hjørdis í blaðstjórnini, hon skrivaði frálíka frásøgn frá stóru 50 ára veitsluni, sum Tryggingarsambandið hevði í 1990, ið varð sera væl fagnað.

Kanska kennir ikki allur heimurin Hjørdis, ið vaks upp á Abbatrøð, enn situr hon á somu steinum á Hoyvíksvegi 22A. Foreldur hennara vóru Erika, f. Justinussen, ættað úr Leirvík, og Affe (Alfred) Egholm, skipari. 6 vóru tey í systkinaflokkinum.

Hjørdis og Heðin giftust í 1966, børnini eru Elin (1966), Ann (1968), Guðrun (1970) og Eirikur (1975). Barnabørnini 8 í tali.

Parturin hjá Hjørdis uttanfyri tryggingina er ikki sørt týðandi, á heimavølli sum uttanlands, sum kona ÍSF forsetans.

Ein av tættunum eru Oyggjaleikirnir, har tey bæði síðan 1989 hava verið við í øllum Oyggjaleikunum, og júst nú leygardagin eru tey afturkomin av Rhodos, heimferðin beinleiðis vardi 15 tímar í luftini.

At Hjørdis Mortensen er fyrstadama, borgmeistarafrúa í Havn hevur ikki við sær at hon ristir á hondum.

Týsdagin 10. juli, fyrrapart, verður samkoma á arbeiðsplássinum á Kongabrúnni henni til heiðurs.

Hjartaliga tillukku Hjørdis og takk fyri góð samstarvsár. Tær og tykkum ynskja vit alt tað besta komandi.

*jl.*

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

-har tað hendir

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin